**Tíðindaskriv**

**Próvtøka at gerast løggildur- og skrásettur grannskoðari.**

Nú verður møguleiki at tekna seg til skrivliga próvtøku at gerast løggildur- og skrásettur grannskoðari. Próvtøkurnar verða hildnar á Glasi í august 2017. **Próvtøkan er á donskum og svarast skal á donskum.**

Fyri at sleppa til próvtøku at gerast løggildur grannskoðari krevst:

1. At umsøkjarin frá einum útlendskum handilsskúla/universiteti hevur staðið eina útbúgving svarandi til grannskoðarakandidatútbúgving (cand. merc. aud.).
2. Útbúgving í føroyskum skattarætti.
3. At umsøkjarin í minsta lagi 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í uppgávum sum viðvíkja grannskoðan av ársroknskapum, samtøkuroknskapum ella samsvarandi roknskaparfrágreiðingum undir eftirliti av einum góðkendum grannskoðara og soleiðis, at í minsta lagi eitt ár er gjøgnumført eftir, at kandidatútbúgvingin sambært nr. 1 er staðin, og í minsta lagi tvey ár eru gjøgnumførd innan fyri tey seinastu trý árini undan freistini fyri tilmelding til grannskoðarapróvtøkuna.

Fyri at sleppa til próvtøku at gerast skrásettur grannskoðari krevst:

1. At umsøkjarin lýkur eina av hesum treytum:
   a) Hevur staðið útbúgving til skrásettan grannskoðara á handilsskúla ella universiteti, ella
   b) Hevur staðið grannskoðarakandidatprótøku, cand.merc.aud,
2. At útbúgving í føroyskum skattarætti 1 og 2 á merkonomstigi ella onnur útbúgving í skattarætti á í minsta lagi sama stigi er staðin, og
3. Umsøkjarin í minsta lagi 3 ár eftir at vera fyltur 18 ár hevur tikið lut í uppgávum, sum serliga viðvíkja grannskoðan av ársroknskapinum, samtøkuroknskapum ella samsvarandi roknskaparfrágreiðingum undir eftirlit av einum góðkendum grannskoðara, og soleiðis at í minsta lagi eitt ár er gjøgnumført eftir, at kandidatútbúgvingin sambært nr. 1 er staðin.

Serliga skiftisskipanin fyri skrásettar grannskoðarar ásetir at:

- **§ 13.** Í seinasta lagi í sambandi við próvtøkuna í 2015 kann umsókn um at sleppa til próvtøku fyri skrásettar grannskoðarar verða latin inn á vanligan hátt. Ein persónur, sum hevur meldað til, men ikki staðið próvtøkuna í seinasta lagi í 2015, og sum framvegis hevur royndir til góðar, sbr. stk. 4, missir sín rætt til nýta tær royndirnar, um viðkomandi ikki meldar seg til próvtøkuna hvørt ár eftir 2015, og so leingi persónurin hevur royndir til góðar. Skráseting Føroya kann gera undantak til 2. pkt., sbr. tó stk. 3.
- *Stk. 2.* Skráseting Føroya kann undir serligum umstøðum loyva, at ein persónur fyrstu ferð søkir um at sleppa til próvtøkuna í 2016, 2017 ella 2018. Ein persónur, sum er meldaður til próvtøkuna í 2016, men sum ikki stendur royndina hetta árið, kann ikki søkja um at sleppa til próvtøkuna aftur í 2018, um viðkomandi ikki hevur søkt um at sleppa til próvtøkuna í 2017. Skráseting Føroya kann gera undantak til 2. pkt.
- *Stk. 3.* Próvtøkan verður ikki hildin aftaná 2018.
- *Stk. 4.* Ein persónur, sum tríggjar ferðir er farin undir próvtøkuna, kann ikki melda til próvtøku aftur.

Skráseting Føroya hevur sett eina próvtøkunevnd at skipa fyri próvtøkuni. Próvtøkunevndin samstarvar við próvtøkunevndina undir Erhvervsstyrelsen, og verður tann føroyska próvtøkan tann sama sum tann danska. Tó verða spurningarnir í skattarætti (modul C og próvtøkuni til skrásettan grannskoðara) svaraðir sambært føroyskum skattarætti. Próvtøkan er á donskum og svarast skal á donskum.

**Próvtøkan til løggildan grannskoðara inniheldur 3 modul**, sum verða hildin við minst 10 daga millumbili: **modul A 3. august 2017**, **modul B 14. august 2017** og **modul C 25. august 2017**. Modulini skulu standast innan eitt tíðarskeið á fýra ár.

**Modul A:** Próvtøkan er tveir tímar og viðvíkur siðalæru og óheftni.
**Modul B:** Próvtøkan er seks tímar og viðvíkur grannskoðanarátekning og øðrum váttanum á roknskap.
**Modul C:** Próvtøkan er fýra tímar og viðvíkur øðrum váttanum og skatta-, partafelags- og vinnurætti.

**Próvtøkan til skrásettan grannskoðara inniheldur 1 modul** sum viðvíkjur økini at góðtaka umbidna arbeiðið, at leggja arbeiðið til rættis og at útinna tað, orða átekningar og frágreiðingar, meta um roknskaparskipanir og váðastýringar, samtøkuroknskapir, greina roknskapir, fyritøkur í kreppu, ættarliðsskifti, spurningar innan roknskap og skatt, fíggingarviðurskifti, virðismetingar, keyp og søla av fyritøkum, greina rentingarføri og kanningar í sambandi við at rationalisera fyritøkur og fyrisitingarliga bygnaðin, **verður hildið tann 28. august 2017**.

Í próvtøkunevndini sita:
Aina L. Knudsen, forkvinna
Fróði Sivertsen, limur
Birita S. Samuelsen, limur
Heri Joensen, limur
Eyðfinnur Jacobsen, limur
Odd Arild Bjellvåg, skrivari

**Umsókn um at sleppa til próvtøku til løggildan grannskoðara skal vera Skráseting Føroya í hendi innan 1. juni 2017.**

**Umsókn um at sleppa til próvtøku til skrásesttan grannskoðara skal vera Skráseting Føroya í hendi innan 1. mars 2017.**

Meira um próvtøkuna fæst at vita við at venda sær til Skráseting Føroya á skr@skraseting.fo

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.